

www.oljan.fo

**Jan Müller** 16 - 10 - 2011

# Oljuvinna í Eysturgrønlandi fer at gagna íslendingum

Íslendingar kunnu vænta at fáa rættiliga væl burturúr, tá oljuvinna fer at taka seg upp undir Eysturgrønlandi. Tað kemur fram í einari samrøðu, sum íslendska Fréttablaðið hevur havt við Hans Erik Lie, sum er jarðfrøðingur hjá oljefelagnum Dana Petroleum. Jarðfrøðingurin vísir á, at í Eysturgrønlandi eru hvørki havnir, flogvøllir ella vegir. Alt hetta er í Íslandi, og tí er lítið at ivast í, at Ísland verður tænastumiðstøð hjá oljuvinnuni í Eysturgrønlandi, sigur hann. Hetta fer at bera í sær, at útgerð og fólk skulu flytast til og frá oljuleiðunum umvegis Ísland, og tað fer at koma skipafeløgum og gistingarhúsum til góðar. Í pengum er talan um milliardir og kanska tíggjutals milliardir íslendskar krónur um árið. Hans Erik Lie sigur við Fréttablaðið, at eftir øllum at døma er nógv olja undir havbotninum við Eysturgrønland, og hann væntar, at verulig vinna fer at taka seg upp har, tá oljufeløgini hava funnið eina milliard tunnur í umráðnum. Sjálvur metir hann, at tað verður í 2020 ella har á leið.